# Umvæla Tinganes fyri 44 milliónir krónur



UMVÆLING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hósdagin handaði Kristian Rasmussen frá Landsverki marjuni Hanusardóttir, løgmansstjóra, heildarætlanina fyri Tinganes, har mælt verður til at umvæla 22 bygningar hjá Landsstýrinum fyri tilsamans 44 milliónir krónur.

Í 2008 var farið undir at orða eina heildarætlan við tí endamáli at fáa alt Tinganes umvælt og skipað í eini heild, so staðið kemur til sín fulla rætt sum fornminni, ið myndar Føroya søgu og tjóðarsamleika, samstundis sum tað verður nýtt til stjórnarfyrisiting. Tað fer eisini at hava við sær, at Tinganes í nógv størri mun kemur ferðavinnuni til góðar.

-Fyrsta stigið er hetta álitið, ið er gjørt sambært arbeiðssetninginum. Næsta stigið er at gera eina byggiskrá og tíðarætlan fyri alt arbeiðið umframt eina verklagslóg, ið skal tryggja, at arbeiðið kann gerast samanhangandi yvir eitt áramál. Síðan og samstundis verður arbeitt eftir ætlanini við Landsverki sum byggiharra, skrivar Løgmansskrivastovan á heimasíðuni.

Verkætlanin verður gjørd í samstarvi millum Løgmansskrivstovuna, Landsverk, Føroya Fornminnissavn og umboð fyri tey stjórnarráð, ið húsast í Tinganesi. Harumframt verða aðrir viðkomandi stovnar o.o. tiknir við í verkætlanina eftir tørvi. Her verður serliga hugsað um Ferðavinnudeildina hjá Uttanríkisráðnum, Tórshavnar Býráð og møguliga onnur, ið hava serligan áhuga í Tinganesi. Felagið Kontrast við Mayfinn Norðoy hevur ráðgivið og skrivað hetta álitið.

Mett verður, at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina verður á leið 44 milliónir krónur. Ætlanin er at brúka níggju milliónir krónur um árið í fimm ár.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av eystri og regn. Seinnapartin minni vindur av suðri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av landsynningi og suðri, seinnapartin sunnudagin minni vindur. Onkur sólglotti leygardagin annars ´ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 14 |
| Madrid | -- |
| Róm | -- |
| Malorca | -- |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. á 52N-25V fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið sunnan fyri Føroyar fer norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/10 kl. 06[00] – 24/10 06[00]. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/10 kl. 06[00] – 13/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 166 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

25. oktober Mánin longst frá jørðini
26. oktober Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. okt | 01:23 | 13:55 | 00:23 | 12:55 | 00:38 | 13:10 | 03:23 | 15:55 | 04:23 | 16:55 | - | 12:10 | 11:10 | 23:43 | 01:38 | 14:10 | 02:38 | 15:10 | 01:08 | 13:40 | 02:23 | 14:55 |
| 28. okt | 02:28 | 14:45 | 01:28 | 13:45 | 01:43 | 14:00 | 04:28 | 16:45 | 05:28 | 17:45 | 00:43 | 13:00 | - | 12:00 | 02:43 | 15:00 | 03:43 | 16:00 | 02:13 | 14:30 | 03:28 | 15:45 |
| 29. okt | 03:03 | 15:21 | 02:03 | 14:21 | 02:18 | 14:36 | 05:03 | 17:21 | 06:03 | 18:21 | 01:18 | 13:36 | 00:18 | 12:36 | 03:18 | 15:36 | 04:18 | 16:36 | 02:48 | 15:06 | 04:03 | 16:21 |
| 30. okt | 03:39 | 15:57 | 02:39 | 14:57 | 02:54 | 15:12 | 05:39 | 17:57 | 06:39 | 18:57 | 01:54 | 14:12 | 00:54 | 13:12 | 03:54 | 16:12 | 04:54 | 17:12 | 03:24 | 15:42 | 04:39 | 16:57 |
| 31. okt | 04:16 | 16:35 | 03:16 | 15:35 | 03:31 | 15:50 | 06:16 | 18:35 | 07:16 | 19:35 | 02:31 | 14:50 | 01:31 | 13:50 | 04:31 | 16:50 | 05:31 | 17:50 | 04:01 | 16:20 | 05:16 | 17:35 |